## Western Isles

Góð 26.000 fólk búgva á Suðuroyggjum, uttaru Hebridunum. Størsti býur er Stornoway, sum nógvir føroyingar, sum hava verið til skips, munnu kenna.. Hebridurnar liggja vestanfyri Skotland. Norðmenn ráddu á Suðuroyggjum í 200 ár, áðrenn skotar fingu valdið á oyggjunum. Western Isles vunnu 6 heiðursmerki á Oyggjaleikunum seinast – og eitt av hesum heiðursmerkjum var úr gulli.



## Ynes Mon

Ynes Mon, sum liggur vestanfyri bretska meginlandi, út fyri útnyðrings partinum walisisku strondini. 69.000 fólk búgva á Ynes Mon, og oyggin er 714 ferkilometrar til støddar. Holyhead er størsti býur á Ynes Mon. Oyggin verður eisini kallað Isle of Anglesey, men walisiska navnið er Ynes Mon. Á seinastu Oyggjaleikunum vann Ynes Mon 6 heiðursmerki.



# Úr Afrika til Álands

**Karin Mikkelsen hevur seinnu árini verið ein av profilunum á bæði kvinnuliðnum hjá SÍ og kvinnulandsliðnum. Nú hon fer til Álands við landsliðnum, er tað eftir eitt kappingarár, har hon bert fekk seinnu hálvu við, tí hon var í Afrika sum volontørur**





einslistir@kallnet.fo
Hilmar Jan Hansen

Tað kann róliga sigast, at fyrireikingarnar hjá Karin Mikkelsen til Oyggjaleikirnar munnu hava verið eitt sindur øðrvísi, enn hjá teimum flestu. Tað er ikki meiri enn hálvt ár síðani, at hon var í Afrika og arbeiddi sum volontørur, men so kom hon heimaftur og hevur arbeitt seg upp.

– Tá eg var liðug at útbúgva meg sum maskinsmiður, ynskti eg at sleppa út sum volontørur, og helst eisini at brúka útbúgvingina. Tað var sjálvandi eitt sindur avmarkað, hvat hon beinleiðis kundi brúkast til, men eg fór so út at arbeiða praktiskt í hálvantriðja máli hjá einum trúboðaraparið í Afrika, greiðir Karin frá.

– Eg misti fyrru helvt av kappingarárinum, og tað merkti eg eisini í seinnu helvt, tí tað tók leingi hjá mær at koma fyri meg. Men nú eg eri komin fyri meg, eri eg glað fyri, at eg ikki misti nakað av tí, sum SÍ upplivdi við tveimum gullmerkjum, og eisini er tað deiligt nú at sleppa við til Oyggjaleikirnar.

### Royndi at venja

Karin sigur, at meðan hon var í Afrika, royndi hon sjálvandi at gera, hvat hon kundi, fyri at halda formin, men at tað sjálvandi var avmarkað, hvussu hon kundi venja. – Men tá eg kom aftur, fekk eg góða hjálp frá liðfeløgunum og venjaranum, at eg skuldi kenna meg væl, hóast eg ikki beinanvegin var »gamla Karin«. Síðani havi eg bara sæð framstig og tað er gingið rætta vegin, sigur hon.

Seinnu árini hevur verið vanligt, at SÍ hevur átt fleiri landsliðsspælarar, bæði hjá kvinnum og monnum, og Karin Mikkelsen heldur, at tað hevur sína góðu forkláring:

– Sørvágur stendur seg væl í flogbóltinum og tað hevur gingið framá øll árini, umframt at stuðulin og áhugin frá bygdini er framúr góður. Spælararnir gevast heldur ikki, men halda fram, tí uppbakkingin er so góð, sigur hon.

– At vit eru so nógvar úr SÍ, sum hesa ferð eru við á landsliðnum, ger tað eisini stuttligt, og tað byggir eisini SÍ-liðið upp, at vit eru fleiri, sum eru í gongd við landsliðnum um summarið. Men hinar liggja heldur ikki á latu síðuni, tí fleiri av teimum dríva á at venja, nú tær annars hava summarfrí. Tá kappingin byrjar aftur, ætla vit so einki at geva frá okkum.

### Eftir gullinum

Uppgávan hjá Karini og hinum kvinnunum á landsliðnum, verður at royna at endurvinna gullið, sum Saaremaa fór avstað við á leikunum á Rhodos fyri tveimum árum síðani.

– Eg eri øgiliga spent, tí eg haldi, at vit hava eitt sterkt lið í ár. Vit fara sjálvandi eftir gullinum, og tað fáa vit vónandi heimaftur við okkum, sigur Karin Mikkelsen, sum er glað fyri, at kvinnulandsliðið fekk tveir dystir ímóti Danmark herfyri, so eitt sindur av dystarvenjing fekst.

– At vit fingu hasar báðar landsdystirnar, gav okkum nógv. Nú ræður so um hjá okkum at taka tað positiva við okkum, samstundis sum vit skulu royna at læra av tí negativa, so vit kunnu betra okkum á teimum økjum, har tað krevst.

Karin Mikkelsen saman við tveimum av liðfeløgunum á kvinnulandsliðnum í flogbólti, Helen á Lakjuni og Sólvá Dimon
Savnsmynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

## FAKTA

**Hesar manna kvinnulandsliðið í flogbólti á Álandi**

Annika á Stongum, SÍ
Birgit Guttesen, SÍ
Helga Guttesen, SÍ
Hjørdis Johannesen, Fleyr
Angeli Joensen, KÍF
Helen á Lakjuni, ÍF
Katrin Petersen, TB
Guðrið Syderbø, Fleyr
Anja Danielsen, Fleyr
Birita Joensen, KÍF
Karin Mikkelsen, SÍ
Sólva Dimon, Svedala Volley

Kristian Mikkelsen, venjari
Jóhan Petur á Stongum, hjálparvenjari

## FLOGBÓLTUR

Sigursvandu føroysku flogbóltskvinnurnar fara aftur hesaferð eftir gullmerkjunum á Oyggjaleikum. Seinastu máttu kvinnurnar taka til takkar við silvuri eftir eina gylta sigursrøð, men vónirnar um at standa aftur ovast á sigurspallinum eru góðar.

Manslandsliðið er broytt nakað. Yngri spælarar hava tikið við, og størsti profilur í føroyskum flogbólti er ikki við hesaferð. Venjarin sigur seg arbeiða langsiktað við liðnum, og í besta føri heldur hann, at teir kunnu koma í finaluna.